# Guðrun setti met í SMS



*Millum 3000 og 4000 fólk vóru sunnudagin komin saman í SMS. Hetta er tað mesta nakrantíð*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Ongin annar hevur megnað at savna so nógv fólk í SMS, sum Guðrun gjørdi sunnukvøldið. Fyrireikararnir meta, at tað hava verið millum 3000 og 4000 fólk á torginum henda dagin**

STJØRNURÓMUR
*Ingrid Bjarnastein*

Sunnukvøldið var tiltak í SMS við Guðrun Sólju Jacobsen, Stjerne for en aften vinnaranum. Har vóru røður hildnar fyri stjørnuni, gávur handaðar og so skuldi hon sjálvsagt eisini syngja vinnaralagið og skriva autografar.

– Sum eg veit um, so hava tað ongantíð verið so nógv fólk í senn í SMS. Eg havi eisini spurt onnur fólk í húsinum, sum hava verið her longur enn eg, og tey vita heldur ikki um nakran, sum hevur megnað at savnað fleiri fólk, sigur Rógvi Róin, marknaðarleiðari í SMS.

Rógvi sigur, at fyrst í 80 árunum vóru tað tó tiltøk, har ung upptraðkaðu, sum kláraðu at savna nógv fólk saman, men ikki í nær námind av, hvussu nógv vóru sunnudagin.

– Vit hava teljarar á hurðunum, sum telja, hvussu nógv fólk koma inn og út. Nøkur ganga sjálvandi nakrar ferðir, men eg meti altso, at har hava verið millum 3000 og 4000 fólk, sigur Rógvi, og tá kann ikki sigast annað, enn at talið vit skrivaðu í Sosialinum í gjár var heilt av leið.

Tiltakið gekk eisini upp á stás sambært marknaðarleiðaranum. Fyrireikararnir høvdu skipað tiltakið væl, og alt klappaði, sum tað skuldi. Eisini seldi 3´arin Stjerne for en aften fløgur, og sum Sosialurin skilir á lagnum vóru tær rivnar vekk eftir stuttari tí, og tá hevur talan verið um 400 fløgur. Hetta merkir tó ikki, at um onkur skuldi ynskt at ogna sær eina Stjerne for en aften fløgu, at hetta er ómøguligt, tí nýggj sending kemur, sambært Rógva Róin aftur til landið.






## Fyrsta Fjølnir blaðið í ár

**Meginfelag Føroyskra Studenta hevur nú givið út fyrsta Fjølnir blaðið í ár**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

Fyrsta Fjølnir blaðið í ár, sum er blaðið hjá føroyskum lesandi uttanlands, er nú komið út.

Í blaðnum verður millum annað skrivað um trupla lestrarvalið, og eisini hevur Jákup Sverri Kass hugleiðingar úr Århus.

Í eini lýsing í blaðnum verður søkt eftir blaðstjóra og skrivstovufólki til skrivstovuna í Keypmannahavn.

Eisini er prát við Guðrið Weihe og Hallu Nolsøe Poulsen, sum báðar lesa stjørnumálafrøði og eru í starvsvenjing í ávíkavist Berlin og Washington.

Fyri lesandi í Danmark er hetta blaðið fínt, og nógv er at frætta um føroyska lestrarlívið á flatlondum.



# Arbeiðsfólk skulu hava minst 10% í lønarhækking

**– Maskinmeistararnir hava gjørt sáttmála við SEV og arbeiðarafeløgini skulu ikki hava minni enn tað, sigur Ingeborg Vinther, nú samráðingarnar við arbeiðsgevararnar eru byrjaðar**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*



*Mánamorgunin hittust arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir á tí fyrsta samráðingarfundinum um nýggjan sáttmála. Sáttmálin er úti 30. apríl og hetta er fyrstu ferð í langa tíð, at øll arbeiðarafeløgini samráðast saman*

Ein lønarhækking upp á 10 %.

Tað er minsta kravið, nú samráðingarnar ímillum Arbeiðarafeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag eru byrjaðar um nýggjan sáttmála.

Øll tey fimm arbeiðarafeløgini, Føroya Arbeiðarafelag, umframt arbeiðsmanna- og arbeiðskvinnufeløgini í Havn og í Klaksvík samráðast saman hesuferð.

Fyrsti samráðingarfundurin var mánamorgunin og tá løgdu báðir partar síni krøv fram og annað hendi ikki á tí fundinum.

Ingeborg Vinther vil ikki siga so nógv um krøvini enn.

Men hon vísir á, at ein sáttmáli er longu gjørdur og at tað hevur verið gamalt, tann fyrsti sáttmálin leggur støðið fyri teir sáttmálarnir, sum koma aftaná.

Sáttmálin, hon sipar til, er tann, sum varð gjørdur herfyri ímillum maskinmeistararnar og SEV.

– Tað er ein tvey ára sáttmáli, sum gevur maskinmeistarunum eina lønarhækking upp á 10,6% tilsamans, tá ið eftirlønin er tald við, sigur Ingeborg Vinther.

Og hon sigur, at hetta verður minsta kravið frá arbeiðarafeløgunum til ein nýggjan sáttmála.

Men hon vísir samstundis á, at verkamannalønin er tann lægsta av øllum og tí er tað misvísandi at rokna lønarhækkingina út í prosentum. 10% av eini lágari løn er nógv minni lønarhækking enn 10% av eini høgari løn og tí skal lønarhækkingin hjá arbeiðarafeløgunum roknast út í krónum og ikki prosentum, sigur IngeborgVinther.

Men talan er eisini um onnur lønarkrøv, men heldur ikki tey vil Ingeborg Vinther siga nakað um enn.

### Arbeiðarafeløgini

Arbeiðarafeløgini hava eisini fingið mótkrøv frá arbeiðsgevarunum, men heldur ikki tey krøvini eru so nógv sagt alment um enn.

Men við Dag og Viku mánakvøldið segði Vilhelm M. Johannesen, at eitt av krøvunum hjá arbeiðsgevarunum er rúmari ræsur at leggja arbeiðstíðina til rættis.

Samstundis sigur Ingeborg Vinther, at onkur av krøvunum frá arbeiðsgevarunum fara arbeiðarafeløgini ikki at góðtaka.

Seinni verður so fundur aftur og tá byrja samráðingarnar av álvara.

### Skulu ikki vænta undantøk

Tær seinastu ferðirnar, samraðingar hava verið, eru tær endaðar við verkfalli. Og tá hevur stórt trýst verðið lagt á Føroya Arbeiðarafelag um at geva undantøk frá verkfallinum til eitt og annað.

Serliga hevur verið tosað um at tað hevur verið neyðugt at geva alivinnuni undantak, tí stór, samfelagslig virði eru í vanda.

Men Føroya Arbeiðarafelag hevur víst á, at undantøk taka skorðarnar undan einum verkfalli. Og Ingeborg Vinther sigur aftur nú, at verður verkfall, eigur ongin at seta nøsina upp eftir, at arbeiðarafeløgini fara at geva alivinnuni ella øðrum vinnum, undantøk.

– Fyri at verkfallið skal vera so effektivt sum gjørligt, og sostatt so stutt sum gjørligt, er neyðugt at halda fast um, at ongi undantøk verða givin og tað haldi eg ikki, at nakar skal vænta heldur hesuferð, kemur tað so langt.

Einastu undantøkini, sum verða givin, er har lív og heilsa er í vanda.

# Jenis av Rana ónøgdur við seksualundirvísing í skúlunum

**Okkurt tilfar, sum verður brúkt í undirvísingini er tað reina porno og Jenis av Rana vil nú hava at vita, um nakrar reglar eru fyri, hvussu undirvísingin er skipað**

SEKSUAL-UNDIRVÍSING
*Áki Bertholdsen*



*Summir skúlar vísa filmar, sum eru harðskapur ímóti børnum, sigur Jenis av Rana. Hann vil tí hava at vita, hjvørjar reglar eru galdandi fyri seksualundirvísingini í skúlanum*

Jenis av Rana, løgtingsmaður er so ónøgdur við seksualundirvísingina í skúlanum, at hann nú fer at reisa málið í ringinum.

Sostatt ætlar hann nú at seta landsstýrismanninum í mentamálum, Høgna Hoydal, nakrar spurningar um seksualundirvísingina í skúlunum.

Hann sigur, at hann ger hetta eftir áheitan frá fleiri foreldrum, sum hava vent sær til hansara, tí tey eru heilt ólukkulig av teirri undirvísing, sum børn teirra fáa í skúlanum.

– Trupulleikin er, at vit taka útlendskt tilfar til okkara, heilt ókritiskt og hann saknar, at Landsmiðstøðin fyri Undirvísingaramboð hugsar seg betri um, áðrenn hon bjóðar skúlunum útlendskt undirvísingartilfar á hesum øki.

– Tað skerst ikki burtur, at donsk og føroysk mentan eru heilt hvør sítt. Og tað ber ikki til at taka tilfar, sum er sprottið úr eini aðrari mentan, inn á okkum ókritiskt, sigur løgtingsmaðurin.

Hann envnir sum dømi tveir sjónbandsfilmar, sum hann hevur sæð.

– Eg vil kalla hesar báðar filmarnar fyri tað reina porno.

Hann vísir eisini á, at tað er ymiskt, hvussu skúlarnir fara fram, tá ið teir verða undirvístir í nøring og seksuallæru.

– Í summum skúlum verða hesir filmarnir vístir í 9. flokki. Á øðrum skúlum verða teir vístur fyri børnum í 7. flokki. Og at vísa teir fyri børnum í 7. flokki og at fóðra tey við slíkum, er at meta sum harðskapur ímóti børnum, tí tá eru tey ov lítil og og óbúgvin til at taka ímóti slíkum.

Hann sigur, at bara tað, at tað er ymiskt, hvørjum aldursflokki ymsir skúlar vísa hesar filmarnar fyri, sigur mær so mikið sum tað, at tað eru ikki nóg greiðar reglar fyri undirvísingini.

– Tað er sjálvsagt, at børnini skulu hava seksualundirvísing , tað er ikki tað, sum er trupulleikin. Men at tað er so ymiskt, hvussu aldursmarkið er í ymsum – skúlum fyri at vísa slíkar filmar, sigur mær, at linjurnar eru ikki nóg greiðar.

Jenis av Rana fer tí at spyrja landsstýrismannin í mentamálum, hvørjar linjur eru lagdar fyri undirvísingini í nøring og um, hvørjar reglugerðir, undirvísingin byggir á.

Hann vil eisini hava at vita, hví føroyskt tilfar ikki verður gjørt ikki hesa undirvísing, tí talan er ikki um so fløkt tilfar.

Og hann vil eisini hava at vita, um landsstýrismaðurin heldur tað vera ílagi, at vit ókritiskt geva føroysku skúlunum undirvísingartilfar, sum er sprottið úr eini heilt øðrvísi mentan, sum ikki hóskar til okkara mentan.

Á hesum báðum filmunum eru tað tveir læknar, sum sita og greiða frá nøring og so verður tað víst við ymsum dømum í filminum.

– Men eitt er innihaldið í filmunum. Eitt annað er, at teir eru ógvuliga illa úr hondum greiddir. Eg havi sæð enskar, upplýsandi tilfar í sjónvarpinum og tað er á einum heilt øðrum, hægri støði enn hesir báðir filmarnir.

# VB fingið fleiri stuðlar

**Í teimum syðru bygdunum í Suðuroy, hava tey stovnað eitt felag sum skal stuðla virkseminum hjá VB**

ÍTRÓTTARSTUÐUL
*Áki Bertholdsen*

Tað eru fleiri og fleiri sum ásanna, hvussu stóran týdning tað arbeiðið hevur, sum ein ørgrynna av fólki kring alt landið, fyri tað mesta sjálvboðið, leggja í at skipa fyri ítróttarvirkseminum av øllum handa slagi.

Tað ásanna tey eisini í syðru helvt í Suðuroy.

Tí hava fólk i teimum syðru bygdunum í Suðuroy nú stovnað felag, sum skal virka fyri at útvega Vágs Bóltfelag fíggjarligan stuðul til tað stóra virksemi, sum har er.

Felagið ætlar serliga at stuðla ungdómsarbeiðnum hjá VB. Ætlanin er ikki, at felagið skal lata VB stuðul til vanliga raksturin. Heldur er ætlanin, at Vágs Bóltfelag skal søkja felagið um stuðul til ávís endamál. Ætlanin er so, at Vágs Bóltfelag kann søkja felagið um stuðul til ávís endamál.

Limagjaldið áseta limirnir at kalla sjálvir, teir kunnu binda seg til at betala eina ávísau upphædd til felagið um mánaðin og Finn Olsen, sum er ein av nevndarlimunum, sigur, at alt er kærkomið. Onkur er, sum betalir 25 krónur um mánaðin, og onkur betalir eitt meir, tað er alt eftir sum hugurin og ráðini eru til.

Men felagið ætlar eisini at skipa fyri ymsum tiltøkum fyri at savna inn pening.

Í nevndini í felagnum sita Hans Jacob Bech í Vági, sum er formaður, Harriet Joensen í Vági er næstformaður, Ásbjørn Berg í Hovi er kassameistari og Finn Olsen í Vági er skrivari. Hinir nevndarlimirnir eru Sólgerð Sørensen í Porkeri, Jeanna í Lágabø í Vági, Petur Ludvig í Vági og Hans Nielsen í Vági.